Mjølnir-ÍF 3-1 (25-13, 25-18, 22-25, 25-13)

# Meistarar í mótvindi

**Tað hevur gingið alt annað enn væl hjá føroyameistarunum ÍF higartil í ár. Tríggir dystir eru taptir, og eftir tapið móti Mjølni eru teir einsamallir í botninum**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*



ÍF kann framvegis kalla seg føroyameistara í mansflogbólti, takkað verið avrikunum seinasta kappingarár. Avrikini higartil í hesum kappingarárinum hava hinvegin ikki havt meistaradám yvir sær — heldur hinvegin.

Sunnudagin spældu teir fyri triðju ferð í hesi kappingini, og fyri triðju ferð taptu teir.

Mjølnir var vertur í Klaksvík, og við 3-1 sigrinum fingu klaksvíkingarnir síni fyrstu stig í kappingini. ÍF vann eisini sítt fyrsta sett í ár, men tað var so langt frá nóg mikið móti einum Mjølnir-liði, sum hevði tamarhald á støðuni so at siga frá byrjan til enda. Bara í triðja setti stóð eitt sindur á, og hetta settið vann ÍF eisini 25-22, men eftir hvat skilst kundi Mjølnir mest takka sær sjálvum fyri, at sigurin bleiv 3-1 í staðin fyri 3-0.

Tað vísir seg ofta, at tá eitt lið hevur vunnið tvey sett og hevur havt lutfalsliga lætt við at vinna tey, so verður slakað í triðja settinum, og klaksvíkingar halda, at tað var tað sum hendi sunnudagin. Fjórða sett vunnu teir eisini sannførandi 25-13.

### Aftur nýggjan hevara

ÍF er altso framvegis stigaleyst aftaná tríggjar dystir. Tað er einki serligt hjá einum liði, sum vann FM fyri einum hálvum ári síðani, men kanska er tað heldur ikki heilt rímiligt at gera samanberingar, tí ÍF-liðið í dag líkist ikki tí, sum spældi í fjør.

Eitt er, at hevarin frá í fjør, Odd Eliasen, ikki er við, men sunnudagin var Bartal Eliasen, sum hevur spælt hevari í ár, heldur ikki við, og tískil máttu fuglfirðingar aftur hava nýggjan hevara móti Mjølni. Boban Ilic er sterkur, men einsamallur klárar eingin at vinna nakran dyst. So í løtuni skal ÍF ikki metast sum meira enn tað teir eru, nevniliga eitt botnlið — sjálvt um teir enn eru føroyameistarar.

Hjá Mjølni kom sigurin sum vera man væl við. Og har eru eisini góð tíðindi at frætta. Eitt er, at John Syderbø er klárur aftur eftir skaða, men harumframt verður Albin Johannesen aftur at síggja á kantinum. Hann hevur verið uttanlands í nøkur ár, men kemur nú heim aftur og fer at spæla við Mjølni. So klaksvíkingar eru við rímiliga gott mót í løtuni.

## Meistaradeild kvinnur

Fleyr-Dráttur 3-2 (25-20, 19-25, 25-15, 11-25, 15-13)
Mjølnir-ÍF 2-3 (15-25, 16-25, 25-18, 25-23, 10-15)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| TB | 2 | 2-0 | 6-0 | 4 |
| ÍF | 3 | 2-1 | 7-5 | 4 |
| Dráttur | 3 | 1-2 | 5-7 | 2 |
| Fleyr | 2 | 1-1 | 3-5 | 2 |
| Mjølnir | 2 | 0-2 | 2-6 | 0 |

## Komandi dystir:

03/11 Dráttur-Mjølnir
04/11 TB-Fleyr

## Meistaradeild menn

Fleyr-SÍ 1-3 (25-20, 23-25, 22-25, 18-25)
Mjølnir-ÍF 3-1 (25-13, 25-18, 22-25, 25-13)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| SÍ | 3 | 2-1 | 7-4 | 4 |
| Fram | 2 | 2-0 | 5-3 | 4 |
| Mjølnir | 2 | 1-1 | 5-4 | 2 |
| Fleyr | 2 | 1-1 | 4-3 | 2 |
| ÍF | 3 | 0-3 | 1-9 | 0 |

## Komandi dystir:

03/11 Fram-Fleyr
03/11 SÍ-Mjølnir

Mjølnir-ÍF 2-3 (15-25, 16-25, 25-18, 25-23, 10-15)

# ÍF upp á silvurplássið



**Tað gekk javnt á, tá ÍF vann á Mjølni í einum fimmsettara í Klaksvík sunnudagin**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

ÍF hevur sett seg á silvurplássið í meistaradeildini hjá kvinnum, eftir at tær vunnu móti Mjølni í Klaksvík sunnudagin. Hinvegin hevur Mjølnir — sum tað einasta liðið í deildini — framvegis síni fyrstu stig til góðar og er aftast.

Tað gekk annars javnt fyri seg, og neyðugt var við fimm settum til at finna ein vinnara. ÍF tók tvey tey fyrstu settini rímiliga lætt (25-15 og 25-16), men so tók Mjølnir sær um reiggj og vann tvey tey næstu ávikavist 25-18 og 25-23. Men ÍF endaði best og vann síðsta settið 15-10.

Hjá Mjølni gjørdi tað mun, tá royndir leikarar komu á vøllin sum dysturin leið. Fyrst tá Tove Riksfjord kom inn miðskeiðis í øðrum setti, og so tá Sólvá Eystberg kom á vøllin til triðja sett. Áðrenn tað hevði ÍF verið klárt tað betra liðið, og serliga varð spælt upp til Helen á Lakjuni, sum vann nógvar bóltar fyri ÍF. Men tað hevur eisini ment liðið, at Randi Larsen er komin aftur á hevaraplássið, og tað gekk sjón fyri søgn leygardagin.



Fleyr-Dráttur 3-2 (25-20, 19-25, 25-15, 11-25, 15-13)

# Viljin sigraði



**Í javnasta dystinum higartil í ár vann Fleyr 15-13 móti Drátti í fimta og avgerandi setti. Við støðuni 13-13 tók ein støða seg upp, sum fekk nógva umrøðu aftaná dystin**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Ikki sørt óvæntað máttu føroyameistararnir úr Drátti leygardagin lúta fyri Fleyr, sum ikki hevur gjørt nógv vart við seg í kvinnuflogbólti seinastu árini. Í fjør endaði liðið næstniðast, og í fyrsta dystinum í ár taptu tær so dyggiliga móti ÍF, sum heldur ikki hevur verið at rokna millum tey sterkastu liðini í kappingini.

Men tað var kanska júst hetta tapið á Kambsdali næstsíðsta leygardag, sum var grundarlagið undir 3-2 sigrinum móti Drátti.

- Vit vóru sera nógv uppsettar til henda dystin, serliga tí avrikið hjá okkum var so út av lagi vánaligt móti ÍF.

Tað sigur Rúna Hentze, sum hevur spælt við Fleyr í nógv ár.

- Og tað var eisini nógv betri hesaferð. Móttøkurnar vóru góðar, álopið var gott, og vit varieraðu spælið hjá okkum væl.

### Inni ella úti?

Tað bleiv eisini ein sera langur og strævin dystur, sum vardi heilar 88 minuttir. Liðini skiftust um at vinna settini. Fleyr vann tað fyrsta 25-20, Dráttur svaraði aftur við at taka tað næsta 25-19, áðrenn Fleyr legði seg á odda 2-1 við at vinna triðja sett 25-15. Í fjórða setti var bara eitt lið á vøllinum, og Dráttur vann heili 25-11. Fleyr-kvinnurnar hingu við høvdunum, og nú var líkt til, at vágaliðið fór at avgera dystin til egnan fyrimun.

Men Fleyr kempaði víðari, og í fimta og avgerandi settinum stóð tað eitt skifti á jøvnum 13-13. Tað var eisini tá, at ein støða tók seg upp, sum elvdi til stórt kjak millum leikararnar bæði undir og eftir dystin. Dráttur hevði servuna og kundi við at vinna næsta stigið fáa dystarbólt ella "matchbólt". Bólturin varð sligin niður í gólvið hjá Fleyr, men spurningurin var, um hann var inni ella úti. Drátturkvinnurnar hildu, at bólturin var góður, meðan tær í Fleyr sum vera man søgdu hann vera úti. Dómarin dømdi hann úti, og sostatt var tað Fleyr, sum kom á odda 14-13 og fekk dystarbólt í staðin fyri Drátt (so javnt var tað). Fleyr vann so eisini næsta bóltin og harvið tað avgerandi settið 15-13. Men tað kundi tað sama farið hinvegin.

Fleyr-SÍ 1-3 (25-20, 23-25, 22-25, 18-25)

# SÍ reistist aftur



**Flogbóltur: SÍ reisti seg aftur eftir ósigurin móti Fram og setti hitt havnarliðið, Fleyr, uppá pláss í Gundadalshøllini leygardagin**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Fyri einari viku síðani skrivaðu vit, at kappingin hjá monnum sá út til at kunna gerast meira spennandi enn nógv høvdu roknað við. Og dysturin leygardagin millum Fleyr og SÍ var enn eitt dømi um, at ein spennandi flogbóltsvetur er í væntu.

SÍ vann dystin 3-1, men settini — kanska burtursæð frá tí síðsta — vóru øll sera jøvn.

Tað at SÍ nú hevur spælt tveir tættar dystir móti Fram og Fleyr, samstundis sum dystirnir millum tey bæði havnarliðini sum oftast eru javnir, kundi bent á, at tað ikki er nógvur munur á hesum trimum liðunum.

Fleyr vann fyrsta sett, men so vendi gongdin seint, men støðugt, til fyrimuns fyri sørvingar, sum fóru avstað við trimum settum á rað og sostatt vunnu 3-1.

Sigurin var í síðsta enda uppiborin. Sum dysturin leið, var tað sum um SÍ hevði størri orku, meðan Fleyr spakuliga misti luftina. Sørvingar vóru meira avgjørdir í sínum álopsroyndum, og teir vístu, at tapið móti Fram eina viku frammanundan var gloymt.

Við sigrinum fekk SÍ oddasessin aftur, men má deila hann við Fram, sum eisini hevur spælt ein dyst færri.

Fleyr kundi við at vinna havt fult stigatal fyri tveir dystir, men teir gjørdust ov stuttir í hesum umfarinum. Men enn eru nógvir dystir eftir, og havnarmenninir taka ikki tapið sum nakra katastrofu. Tað er enn góð tíð til at taka mistu stigini innaftur.

# Síðsta árið skal helst geva gull

**Ein av veteranunum í meistaradeildini hjá monnum er Klæmint Isaksen, sum í flogbólti hevur roynt meir enn teir flestu. Hann hevur avgjørt at gevast við flogbóltinum, tá henda kappingin er liðug, og vónin er at enda sum føroyameistari**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Leygardagin tapti Fleyr móti SÍ og datt tí eitt sindur afturum sørvingar og Fram, sum nú eru felags um oddasessin í meistaradeildini hjá monnum. Men hóast tapið eru vónirnar góðar hjá Fleyr, sum ætlar sær at gera seg galdandi millum tey fremstu liðini í vetur.

Hetta skal gerast við góðari hjálp frá royndum leikarum, sum seta sín dám á liðið. Ein av hesum er Jan Hentze, sum ikki var við í fjør, men sum nú aftur venur við fullari ferð og er aftur á liðnum. Ein annar er Klæmint Isaksen, sum er klaksvíkingur, men sum nú í nøkur ár hevur spælt við Fleyr, har hann eisini hevur roynt seg sum leikandi venjari okkurt árið.

Hann heldur, at hóast aldurin talar eitt sindur ímóti, so kann Fleyr gera seg galdandi í kappingini í ár.

- Miðalaldurin á liðnum er tann hægsti í meistaradeildini, men vit hava eitt heilt hampuligt lið, heldur hann.

### Skulu gera ein vørr í seinnu helvt

- Vit kunnu gera okkum galdandi í kappingini um FM. Men sum tað so ofta verður sagt, so mugu vit sleppa undan ov nógvum skaðum, fyri at tað skal lata seg gera.

Klæmint sigur, at teir sum so vóru nøgdir við triðjaplássið, teir fingu í fjør, men at teir í ár fara eftir gullinum.

- Vónandi kunnu vit hava eina rímiliga stabila fyrru helvt og so gera ein vørr í seinnu helvt, tá stigini so at siga telja dupult so nógv, sigur hann.

- Vit fara eisini at leggja okkum eftir at koma í steypafinaluna. Tað eydnaðist ikki í Fleyr-kappingini, sum SÍ vann, men Mjølnir-kappingina ætla vit okkum at vinna, sigur maðurin, sum nú aftur er farin at spæla hevari. Tað hevur hann gjørt fyrr, men ikki tey seinastu árini, og sambært honum sjálvum er hetta nakað, sum krevur eitt sindur av tíð at venja seg við aftur.

### Takkar fyri seg

Klæmint Isaksen hevur gjørt av, at hetta verður hansara seinasta kappingarárár á hægsta stigi í føroyskum flogbólti. Hann er eftirhondini vorðin 35 ár og heldur, at tá henda kappingin er liðug, er tíðin komin til at gevast og lata aðrar og yngri kreftir sleppa framat.

Tað er eingin ivi um, at hann er ein av teimum føroysku flogbóltsleikarunum, sum hevur fingið mest burturúr sínum ítrótti. Hann hevur roynt seg á hægsta stigi í Danmark við felagnum Skt. Jørgens, og umframt at hava verið føroyameistari hevur hann eisini verið drúgvur á landsliðnum.

Men nú tekur hann so fyrst eitt tørn afturat við Fleyr, og málið er at standa við einum gullmerki, tá kappingin er liðug í mars næsta ár.